Jólagávan til tey nótakønu

Fløgan Mánadags Mortan kom út beint fyri jól sí›sta ár

Sanghefti› vi› nótum er útkomi›. Ta› eru sangirnir á fløguni Mánadags Mortan, sum kom út fyri einum lítlum ári sí›an, i› nú eru settir út á nótar.

TÓNLEIKUR

Sangirnir eru útsettir fyri gittar, klaver ella keybord. Útsetingarnar eru gjørdar á ymiskum stø›i.Solei›is at bæ›i tey, i› júst eru byrja› at spæla og eisini tey ví›arikomnu kunnu fáa gle›i av nótaheftinum. Til seks av sangunum er upptekna› fylgispæl og eitt klaverstykki› til sangin:Konan sat á bríkini, er eisini at finna í heftinum.
Útsetingarnar eru vælegna›ar í frálæru í klaver og keybord.

Pakkatilbo›

Fløgan Mánadags Mortan kom út beint fyri jól sí›sta ár. Sølan hevur gingi› hampuligt, sigur Jens Mortan Mortensen, i› hevur gjørt øll løgini á fløguni og sum hevur sta›i› fyri útgávuni. Fløgan er eitt nú útseld í fløguhandlinum TUTL, sum hevur givi› fløguna út.

Fløgan Mánadags Mortan ver›ur nú uppafturprenta›. Í tí sambandi ver›ur møguligt at keypa eitt pakkatilbo› fram til jóla, har fløga og nótahefti kann keypast fyri bíligan penga.

Flokssett og »syng -vi›« fløga.

– Vit hoyra mangan lærara siga, at torført er at undirvísa í sangi, tá i› ein ikki dugir at spæla eitt instrument ella tá i› ein ikki dugir nótar. Og at sangur sum lærugrein í fólkaskúlanum, onkuntí› hevur sæ› betri dagar, sigur Jens Morten Mortensen.

Allir skúlar í landinu hava júst fingi› tilbo›, um at keypa Mánadags Mortan sanghefti› sum flokssett, eina vanliga fløgu og eina syngvi›fløgu.

Syng vi› fløgan ver›ur bara gjørd til skúlabrúks. Á syng vi› fløguni er bert tónleikurin innspældur.

Mánadags Mortan kom út sum yrkingarsavn í 1989 av forlagnum Fannir. Ta› er Alexandur Kristiansen, i› hevur skriva› fittu barnayrkingarnar. Frits Johannesen hevur tekna› myndirnar. Ólivant í Leynum, Sunnudags Símun og Leygardags Lars og a›rir eru tí eingir ársungar. Nógv børn í Føroyum kenna tí hesar yrkingar, sum nú kunnu syngjast.

Nakrir lærarar í Su›uroy hava roynt sanghefti innan skúlagátt hetta skúlaári›, eitt nú í lærugreinini føroyskt til 1, 2, 3 flokk, og lata teir væl at.


Kósin hjá føroyska vinnulívinum tykist í løtuni bert at ganga ein veg. Frameftir

Tilgjørd mynd

Gloymska vi› grape

Fyrst í desember kemur n‡ggj fløga, i› samstundis er fyrsta avrik hjá Unn Patursson sum einstaklingur. Vi› á fløguni er hópur av tónleikarum og nøvnini borga fyri gó›sku. Partur av upptøkunum eru farnar fram í n‡ggjum upptøkuhølum í Keypmannahavn

Unn Patursson gevur í desember út fløguna Gloymska vi› Grape, i› er hennara fyrsta fløga sum einstaklingur. Her er Unn Patursson avmynda› saman vi› bólkinum Enekk

(savnsmynd)

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Unn Patursson er ikki eitt heilt óskriva› bla› í føroyskari tónleikasøgu. Hon hevur sungi› vi› eittnú Enekk, Haldurs Café og á útvarpsfløgum og fløgum hjá Fer›slutrygd.

Men eingin útgáva er vi› Unn Patursson sum einstaklingi. Hetta ver›ur bøtt um nú, tí fyrst í desember kemur fløgan Gloymska vi› grape.

Borga fyri gó›sku

N‡ggja fløgan vi› Unn Patursson er merkt av, at vit liva í Vesturheiminum vi› poppmentan og MTV. Hetta er vi› vilja, men vísurøtturnar lata seg ikki fjala.

– Eg havi sjálv havt ilt vi› at ey›merkja tónleikin, men talan er um popp, sum jú er eitt breitt hugtak. Tó er okkurt vísukent vi›, sigur Unn Patursson um n‡ggju fløguna vi› forvitnisliga heitinum Gloymska vi› Grape.

Systkinabarn Unn, Ári Patursson, hevur skriva› tveir av tekstunum. Unn hevur skriva› restina og saman vi› Rógva á Rógvu hevur hon smí›a løg. 14 løg eru á fløguni.

Eini 17 tónleikarar eru vi›, og flestu teirra hava langt sí›ani prógva›, at navn teirra borgar fyri gó›sku. Rógvi á Rógvu leikar trummur og hann hevur eisini framleitt, produsera›. Unn tekur sær av sangi og kóri, Leivur Thomsen og Jákup Zachariassen leika guitar, Finnur Hansen, Magnus Johannessen og Kim Hansen leika tangentar, Mikael Blak, Jan Zachariassen og Bár›ur Háberg leika bass, Kaj Johannessen slagverk og Mortan Zachariassen leikar saxofon. James Olsen hevur vokalt innslag og umframt Unn, so syngja Ey›un Nolsøe og Roin Siggertsson kór.

Navnframi Óli Poulsen ljó›blandar fløguna.

N‡ggj upptøkuhøli

Upptøkurnar eru farnar fram í ÚF, á Háskúlanum, heima hjá Rógva á Rógvu, á Oyrasundi á Amager og í n‡ggju upptøkuhølunum hjá Leivi Thomsen og Ey›finni Jensen. Hesi bera navni› Media Music Aps.

Jenny W. Poulsen hevur tiki› myndir til húsan og Unn Patursson hevur sett upp og tiki› sær av tekstinum. Umframt sangtekstir, so sæst eisini júst hvør leikar hvat og hvar.

Unn Patursson lesur í løtuni til bókavør› í Keypmannahavn. Hon hevur gingi› á Dark, i› er alternativt musikkonservatorium fyri rútmiskan tónleik.

Unn fegnast um, at ta› er eydnast at fáa dugnaligt fólk vi›, nú hon sjálv gevur fløgu út. Hon drálar, tá hon ver›ur spurd, um hetta er gamal dreymur, men játtar.

– Fyrr havi veri› gla› fyri at vera vi›. Tá havi eg veri› bi›in. Nú havi eg sjálv tiki› stig til hetta og leggi naka› fyri onnur, sigur Unn Patursson um fløguna Gloymska vi› Grape, sum kemur um nakrar vikur.

Vinnulívi› blomstrar

Grannsko›anarfyritøkan, KPMG, hevur júast lati úr hondum eitt yvirlit fyri part av føroyska vinnulívinum. Yvirøvur er gongdin fyri vinnuna positiv

ROKNSKAPIR
Jákup Mørk

Framgongdin í føroyska búskapinum tykist at ganga fram á vi› fullari fer›.

Grannsko›anarfyritøkan, KPMG, hevur í hesum døgum lati› úr hondum Roknskparanalysuna 2000, og sæ› yvir ein kamb er einki at fara skeivur av. N‡tslan í føroyska samfelagnum økist stø›ugt, og vi›førir hetta alsamt størri virksemi hjá privatu vinnuni.

Økt søla og vinningur

Til lat meta um gongdina, hevur KPMG sett upp fleiri sonevnd lyklatøl. Hetta eru tøl, sum á ymsar hættir gera ta› lælttari hjá roknskaparlesaranum at taka stø›u til, hvussu væl fyritøkurnar eru fyri.

Einasta lyklatali›, sum ikki er økt í mun til 1998 er gjaldførislutfalli. T.v.s. hvussu nógva lætt umsetiliga ogn felagi› eigur í mun til ta› skuld, sum fellur til gjaldingar innan eitt ár. Her er ein minking, sum í stóran mun stavar frá økta virkseminum, eins n‡íløgur hjá virkjunum eru fíggja›ar vi› gjaldførinum, heldur enn vi› lántøku. Hóast gjaldførislutfalli› er minka›, er hetta tó væl og vir›iliga á einum stø›i, sum má metast sum nøktandi.

Øll hini lyklatølini, sum n‡tt ver›a í analysuni eru betri í 1999, enn tey vóru í 1998.

Nettosølan hjá virkjunum øktist gó› 16%, og umframt hesa øking, kasta›i raksturin eisini lutfalsliga meira av sær til virkini. Naka› sum aftur vi›førir eina økt avkast upp á bæ›i samla›u ognir felagsins og eginognina.

Gó› renta, men einki innskot

Serliga áhugavert tykist ta› vera, at avkasti› av eginognini framvegis er í vøkstri.

Ta› er jú av alstórum t‡dningi fyri møguligar innkjótarar, at avkasti› upp á íløguna er so gott sum gjørlgt. Roknskaparanalysan s‡nir, at eginpeningsavkasti› í 1999 var 10,3%. Ta› vil siga, at ikki bara er avkasti› omanfyri innlánsrentuna hjá peningastovnunum, men eisini omanfyri rentuna av eitt nú donskum lánsbrøvum vi› statsgarantii.

Avkasti› til partaeigararnar er tó í løtuni ikki ta› heilt stóra. Í mun til eginpeningin vi› ársbyrjan, vór›u bert 0,8% av vir›inum útgoldin sum vinningsb‡ti. Hetta kemst tó helst eisini av, at fyri fleiri føroyskar fyritøkur er enn galdandi, at tey í fyrstu atløgu skulu konsolidera felagi›.

Harumframt eru fleiri av fyritøkunum sonevndar familjufyritøkur, og her sæst ein betra›ur rakstur ofta aftur í hægri lønum til starvsfólkini.

Ta› er tó merkisvert, at hóast útlitini fyri gó›um avkasti av íløgum í føroyskt vinnulív, so hevur einki av teimum feløgum, sum analysan fevnir um, økt partapeningin í roknskapaárinum.

Bjørt útlit

Umframt at roknskaparanalysan s‡nir ein betra›an rakstur og eitt betra avkast hjá vinnuni, so er eisini fleiri lutir, sum benda á eitt økt bjartskygni fyri komandi tí›ina.

Íløgurnar, sæ› í mun til starvsfólkatali›, øktust vi› knappari helvt, eins og goymslurnar av vørum øktust vi› 18%.

Grundarlag

Roknaksparanalysan fevnir um tann partin av føroyskum vinnulívi›, sum ikki er beinlei›is tengt at fiskivinnu, fíggjarvinnu, tryggingarvirksemi, millumlanda flutningsvinnu ella oljuvinnu.

Analysan byggir á roknskapir, grannsko›a›ir av KPMG, hjá virkjum vi› einari nettosølu omanfyri 1 mió.kr.

Innan umrøddu vinnuøki umbo›a feløgini 15% av føroyska virkseminum, mett eftir lønarútgjaldingum, og kann tí metast at vera umbo›andi fyri føroyska vinnulívi› sum heild.

Dagtilhaldi› í Rók er opi›

Í einum sethúsum í Rókini í Saltnesi heldur Dagtilhaldi› í Rók til. Dagtilhaldi› er fyri børn vi› serligum tørvi, sum annars ikki hava stovnspláss. Hósdagin ver›ur húsi› opi› fyri almenninginum millum klokkan 14 og 17 seinnapartin

SOSIALMÁL
Edvard Joensen

Børnini sum koma í Dagtilhaldi› í Rók hava nógvar fyrimunir av at vera saman

Mynd: Edvard Joensen

Saltnes: Í Dagtilhaldinum í Rókini eru átta børn vi› serligum tørvi dagliga savna›. Sjey teirra eru børn undir skúlaaldur, sum annars ikki hava pláss á nøkrum dagstovni, me›an eitt barn kemur í húsi› eftir skúlatí›.

Starvsfólkini í húsinum eru persónligir stu›lar hjá børnunum. Nes- og Runavíkar Kommuna bera kostna›in, men eingin dagglig lei›sla er í húsinum. Og ta› er ein vansi, siga stu›larnir.

Hósdagin frá klokkan 14.00 til klokkan 17.00 seinnapartin ver›ur opi› hús í Rókini, har øll, sum vilja, eru vælkomin inn á gólvi›, siga stu›lar og foreldur at børnunum, sum koma í Dagtilhaldi› í Rók.

Runavíkar- og Nes Kommunur hava í felag lati› upp tilhald fyri børn vi› serligum tørvi. Talan er breka› um børn, alt frá spastikarum til børn, sum onga diagnosu hava fingi› setta, men sum hava tørv á ansing alt samdøguri›.

Vanligt hevur veri›, at hesi børnini hava veri› ansa› heima av einum persónligum stu›ulsfólki. Ta› veri› seg í heiminum hjá barninum ella vi›hvørt eisini heima hjá stu›ulsfólkinum.

Skipanin hevur havt vi› sær, at fólkini, bæ›i tann ansa›i og stu›ulin, hava veri› rættiliga einsamøll. Tí er ynski komi› um at fáa eitt sta›, har fleiri fólk eru savna› allan dagin. Og ta› hevur avgjørt nógvar fyrimunir vi› sær, siga stu›larnir, sum dagliga koma í Dagtilhaldi› í Rók, sum sta›i› ver›ur nevnt.

Ta› er solei›is, at børnunum tørvar hjálpitól til dagligu tilveruna. Tólini eru ikki altí› líka løtt at fá hendur á. Men av tí, at børnini savnast í sama húsi, ber til at n‡ta og fáa gle›i av hjálpitólunum hjá hvørjum ø›rum, ta tí›ina, tey annars standa óbrúkt.

Ein annar avgjørdur fyrimunur vi› at vera í sama húsi er, at nú ber til hjá fysioterapeuti og ergoterapeuti at geva vi›ger›ir sínar á sta›num, har børnini eru.

Fyrr var ta› solei›is, at tá børnini, sum hava stóran tørv á millum ø›rum fysioterapi, skuldu til vi›ger›ar, skuldu tey flytast heiman. Ta› kundi í fleiri førum vera heldur trupult, tí børnini eru likamliga illa fyri. Ta› tekur langa tí› at lata tey í og úr. Tey skulu flytast vi› bili og har fáast bæ›i í og úr. Vi›ger›in tekur ikki so øgiliga langa tí›, og so sama túrin umaftur. Ta› mø›ir tey, og slítur sjálvandi eisini.

Vi› hesi skipanini í Dagtilhaldinum, kemur terapeuturin til børnini heldur enn øvugt. Ta› ger alt nógv lættari hjá teimum.

Stu›larnir hjá børnunum, sum eru í dagtilhaldinum siga, at rammurnar um tilhaldi› eru sera gó›ar. Kommunurnar hava í felag leiga› eini sethús í Saltnesi, sum í síni tí› eru gjørd júst til eitt breka› barn. Ongar gáttir eru at fara um. Hur›arnar eru brei›ar, og lyft er í kjallaran umframt anna›, sum tøvur er á.

Einasta, sum eftir er at ynskja, er betri tilkoyring og parkeringsmøguleikar uttanfyri. Stø›an hjá børnunum ger, at tey mugu flytast vi› bili, og húsi› liggur ni›an fyri vegin. Ta› ger so aftur, at trupult kann fara at ver›a at koma til í hálku.

Ein annar, og heldur ikki minni trupulleiki er, at eingin føst lei›sla er í húsinum. Sum stø›an er nú, siga stu›larnir, eru ta› bara tey sjálv, sum skipa fyri. Samstundis sum tey eisini skulu brúka fulla tí› at ansa børnunum.

Hev›i ein skipa› lei›sla veri› fyri húsi›, hev›i bori› enn betri til at fingi› ta› optimala burtur úr teimum sera gó›u umstø›unum, sum húsi› gevur. Eitt nú so einfaldum tingum sum at syrgt fyri at samskipa avtalur. Gjørt vaktarskipanir fyri starvsfólkini, um eitt nú vikuskiftisvaktir skuldu veri› o.s.fr.

Ta› er solei›is, siga tey, at foreldrini at børnunum eisini hava brúk fyri umlætting vi›hvørt. Til dømis okkurt vikuskifti, kundi húsi› saktans veri› opi›. Men ta› krevur meira skipa› vi›urskifti, enn tey eru júst nú.

Sum er, er stø›an tann, at kommunurnar hava lati› húsi›, men Almanna- og Heilsumálast‡ri› hevur yvirorna›u ábyrgdina av rakstrinum. Verkætlanin er bara ein royndarskipan, sum tey longu nú kunnu siga, riggar væl. Men ta› krevur skipa› vi›urskifti, sum tey, i› eru stu›lar hjá børnunum ikki hava ávirkan á.

Sosialurin hevur sett seg í samband vi› Almanna- og Heilsumálast‡ri› fyri at frætta, hvussu landi› liggur. Men vi›komandi, sum umsitir máli› var ikki at hitta, á›renn bla›i› fór til prentingar. Væntandi ver›ur meira at frætta um máli› í seinni bla›.

Dryppar eisini á starvsfólkini

Ta› eru ikki bert virkisánararnir, sum fáa ágó›an av øktu n‡tsluni í samfelagnum. Eisini á starvsfólkasí›uni merkist hetta

Sum ta› framgongur a›rasta›ni í bla›num, so s‡nir Roknskaparanalysan 2000 hjá KPMG, at bæ›i søla og vinningur hjá føroyskum fyritøkum stendur í vøkstri.

Umframt at hetta sjálvsagt er ein gó› stø›a hjá virkiseigarunum, so sæst hetta eisini aftur í samfelagnum sum heild.

Lønarútgjaldingarnar hjá teimum 52 virkjunum, sum analysan umfatar, eru í 1999 øktar vi› 16% í mun til 1998. Í mun til 1995 er talan um eina øking upp á 65%.

Økingin stavar bæ›i frá einum øktum starvsfólkatali, og øktari læn fyri hvørt starvsfólki sær.

Tali› av starvsfólkum er í mun til 1998 økt vi› 8%, og í mun til ’95 vi› 42%. Samstundis er lønarútgjaldingin pr. starvsfólk økt vi› 8% í mun til 1998 og vi› gó›um 15% í mun til 1995.

jm


At ta› gongur fram á hjá vinnuni ávirkar eisini einstaka arbei›aran